# Umhvørvismálaráðið

Dagfesting: 11. september 2024
Mál nr.: 23/10590
Viðgjørt: ARØ/MK/LP/SDJ
Ummælistíð: frá 23-09-2024 til 14-09-2024
Eftirkannað: Lógartænastan dagfestir

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin)**
(Áseting um talgilt samskifti og fráboðan og broyting í krøvunum til samansetingina av Vanlukkutryggingarráðnum)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 48. frá 8. mai 2012, løgtingslóg nr. 51 frá 12. mai 2015 og løgtingslóg nr. 108 frá 10. oktober 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 25 verður sum stk. 3 sett:

"*Stk. 3.* Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, at upplýsingar skulu skrásetast og sendast talgilt, og kann áseta nærri reglur um talgilda samskiftið."

**2.** § 27, stk. 1, verður orðað soleiðis:

"Vanlukkutryggingarráðið hevur fimm limir, sum landsstýrisfólkið velur. Forfólkið skal vera løgfrøðingur, og ein limur skal vera útbúgvin lækni og verða tilnevndur eftir tilmæli frá Vanlukkutryggingarráðnum. Limirnir verða valdir fyri fýra ár í senn, tó so at limur verður sitandi, til nýggjur limur er valdur."

**3.** § 27, stk. 2, verður orðað soleiðis:

"*Stk. 2.* Limir í Vanlukkutryggingarráðnum mugu ikki starvast hjá ella taka lut í leiðsluni í tryggingarfelag, sum teknar arbeiðsskaðatryggingar í Føroyum, vera limur í ella starvast í Vinnusjúkugrunninum ella starvast hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum."

**4.** § 27, stk. 3, verður orðað soleiðis:

"*Stk. 3.* Vanlukkutryggingarráðið skal hava skrivara, sum hevur lokið løgfrøðiligt embætisprógv. Vanlukkutryggingarráðið kann lata skrivaranum heimildir at taka avgerð í ávísum málum."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kungjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Eftir áheitan frá sorinskrivaranum flutti landsstýrið á heysti 2023 umsitingina av Vanlukkutryggingarráðnum frá Føroya Rætti til Arbeiðs- og brunaeftirlitið. Sorinskrivarin heitti samstundis staðiliga á landsstýrið um at broyta ásetingarnar í arbeiðsskaðatryggingarlógini, so hann ikki longur skuldi vera fast forfólk í Vanlukkutryggingarráðnum. Orsøkin er, at arbeiðsbyrðan er ov stór, og at hendan uppgávan liggur ikki innanfyri høvuðsvirksemið hjá Føroya Rætti. Nú umsitingin hevur ligið hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum síðani november 2023, verður mett, at flytingin er hepnast somikið væl, at tíðin er búgvin til at loysa sorinskrivaran frá skylduni at virka sum forfólk í Vanlukkutryggingarráðnum.

Flytingin av umsitingini til Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur eydnast væl og hevur longu givið møguleikar fyri fleiri samvirkandi fyrimunum, soleiðis at borgarar og partarnir á arbeiðsmarknaðinum v.m. einans skulu fyrihalda seg til ein myndugleika, eina heimasíðu, kunning o.a. Harumframt gevur flytingin møguleika fyri einari skynsamari gagnnýtslu av fíggjarliga tilfeinginum og arbeiðsorkuni innan arbeiðsumhvørvisøkið. Fyri at gera málsviðgerðina enn smidligari verður mett, at tað er skynsamt, eisini fyri rættartrygdina hjá teimum tryggjaðu, at møguleiki er at heimila skrivaranum at taka avgerð í ávísum málum. Í løtuni kann viðgerðartíðin gerast rættuliga drúgv, millum annað orsakað av, at Vanlukkutryggingarráðið sjálvt, á fundi, skal taka avgerð í øllum málum, eisini um talan er um løtt og greið mál. Eftirsum talan er um rættuliga nógv mál, fleiri enn 350 um árið, er sera trupult hjá Vanlukkutryggingarráðnum at náa øll málini á teimum 15-20 árligu fundunum hjá ráðnum. Við at flyta málsviðgerðina av ávísum málum til Arbeiðs- og brunaeftirlitið kann málsviðgerðartíðin verða stytt, og Vanlukkutryggingarráðið fær betri stundir at viðgera tyngru og meira prinsipiellu málini.

Fyri at beina burtur allan iva um gegni hjá ráðslimum verður § 27, stk. 2 víðkað soleiðis, at starvsfólk hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum ikki kunnu tilnevnast sum limir í Vanlukkutryggingarráðnum.

Umframt omanfyri nevndu broytingar í lógini, verður ásett í lógaruppskotinum, at landsstýrisfólkið fær heimild at áseta nærri reglur um talgilt samskifti. Hetta kann gerast viðkomandi fyri at fáa fullan ágóða burtur úr tænastum og møguleikum hjá Talgildu Føroyum í hesum sambandi.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Sambært § 27, stk. 1 í galdandi arbeiðsskaðatryggingarlóg er Vanlukkutryggingarráðið mannað av einum dómara frá Føroya Rætti sum forfólk umframt 4 nevndarlimum, sum landsstýrismaðurin tilnevnir, har ið ein teirra skal vera útbúgvin lækni og verða tilnevndur eftir tilmæli frá Vanlukkutryggingarráðnum, fyri 4 ár ísenn. Harumframt velur landsstýrismaðurin 3 varalimir fyri 4 ár í senn.

Sambært § 27, stk. 4 mugu limir og varalimir í Vanlukkutryggingarráðnum ikki starvast hjá ella taka lut í leiðsluni í tryggingarfelag, sum teknar arbeiðsskaðatryggingar í Føroyum, ella vera limur í ella starvast í Vinnusjúkugrunninum.

Sambært § 27, stk. 3 skal Vanlukkutryggingarráðið hava skrivara, sum hevur lokið løgfrøðiligt embætisprógv ella annað viðkomandi prógv frá hægri lærustovni.

Ongin áseting er í galdandi lóggávu um talgilt samskifti.

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógarsuppskotinum er at gera broytingar í arbeiðsskaðatryggingarlógini, soleiðis at sorinskrivarin ikki longur er fast forfólk í Vanlukkutryggingarráðnum, men at landsstýrisfólkið fær heimild at velja annað forfólk, sum skal vera løgfrøðingur.

Endamálið við lógaruppskotinum er harumframt at áseta greiðar gegnisreglur, soleiðis at ongin ivi er um gegnið hjá t.d. Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.

Endamálið við lógaruppskotinum er eisini at geva Vanlukkutryggingarráðnum møguleika at stytta um málsviðgerðartíðina, við at kunna heimila skrivaranum hjá ráðnum at taka avgerðir í ávísum málum vegna ráðið.

Harumframt er endamálið við uppskotinum at geva landsstýrisfólkinum heimild at áseta nærri reglur um talgilda fráboðan og samskifti.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við lógaruppskotinum verður farið frá gomlu skipanini, har sorinskrivarin við lóg er fast forfólk í Vanlukkutryggingarráðnum, til eina skipan, har landsstýrisfólkið fær heimild at velja annað skikkað forfólk við útbúgving sum løgfrøðingur.

Vanlukkutryggingarráðið kann lata skrivaranum í ráðnum heimild at taka avgerðir í løttum málum.

Harumframt fær landsstýrisfólkið heimild at áseta nærri reglur um talgilda fráboðan og samskifti.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar við sær fyri land og kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Umsitingin av Vanlukkutryggingarráðnum flutti til Arbeiðs- og brunaeftirlitið síðst í 2023. Hetta hevði við sær, at nøkur starvsfólk vórðu sett fyri at arbeiða við vanlukkutryggingarmálum. Tað eru tryggingarfeløgini, sum bera kostnaðin av Vanlukkutryggingarráðnum. Áðrenn umsitingin varð flutt, rindaðu tryggingarfeløgini fyri, at Føroya Rættur umsat Vanlukkutryggingarráðið.

Sorinskrivarin verður ikki fastur limur í Vanlukkutryggingarráðnum longur. Hetta fer at hava jaligar umsitingarligar avleiðingar fyri Føroya Rætt, sum fer at kunna brúka leysgivnu arbeiðsorkuna upp á høvuðsuppgávur sínar. Harumframt fær uppskotið væntandi jaligar avleiðingar fyri málsavgreiðsluna hjá Vanlukkutryggingarráðnum, vísandi til, at sorinskrivarin í fleiri førum hevur víst á, at hann ikki hevur nøktandi møguleika at raðfesta hesar arbeiðsuppgávurnar afturat virkseminum sum sorinskrivari.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur hvørki fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar við sær fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk økir í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið er ikki í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan, evropeiska mannarættindasáttmálan ella sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

### 2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ikki markaforðingar við sær.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir og ger ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki beinleiðis likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi, men uppskotið inniheldur heimild til, at landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um talgilt samskifti.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Ásett verður í lógaruppskotinum, at landsstýrisfólkið velur limirnar í Vanlukkutryggingarráðnum. Uppskotið hevur tríggjar broytingar við sær. Sorinskrivarin verður ikki fast forfólk í Vanlukkutryggingarráðnum, men landsstýrisfólkið velur eitt forfólk, sum er løgfrøðingur. Lagt verður tó afturat, at limir í Vanlukkutryggingarráðnum ikki mugu starvast hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.
Eisini fær landsstýrisfólkið heimild til at áseta nærri reglur um talgilt samskifti.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

**§ 1, nr. 1**
Tað krevur heimild í løgtingslóg, um tað skal vera kravt av borgara ella fyritøku, at tey skulu samskifta við almennar myndugleikar talgilt. Í sambandi við menningina av borgaravendum tænastum, ið kunnu nýtast umvegis Talgildu Føroyar, er neyðugt at hava hesa heimild í arbeiðsskaðatryggingarlógini. Tí verður skotið upp, at landsstýrisfólkið fær heimild at áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi.

**§ 1, nr. 2**
Við hesi áseting verður farið frá gomlu skipanini, har sorinskrivarin við lóg er fast forfólk í Vanlukkutryggingarráðnum, til eina skipan, har landsstýrisfólkið fær heimild at velja annað skikkað forfólk, sum er løgfrøðingur.
Landsstýrisfólkið velur harumframt hinar fýra limirnar í Vanlukkutryggingarráðnum, har ein limur skal vera útbúgvin lækni. Valið av læknanum er eftir tilmæli frá Vanlukkutryggingarráðnum.
Skotið verður eisini upp at strika ásetingina um, at landsstýrisfólkið skal velja 3 varalimir.

**§ 1, nr. 3**
Skotið verður upp at broyta § 27, stk. 2 soleiðis, at hon eisini fevnir um starvsfólk hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum. Broytingin hevur til endamáls at tryggja, at ongin ivi er um óheftni hjá bæði Arbeiðs- og brunaeftirlitinum og Vanlukkutryggingarráðnum.

**§ 1, nr. 4**
Skotið verður upp at broyta § 27, stk. 3 soleiðis, at einans persónar, ið hava lokið løgfrøðiligt embætisprógv, kunnu røkja leiklutin sum skrivari hjá ráðnum. Hetta er fyri at tryggja, at skrivarin altíð hevur nøktandi førleikar til at greina løgfrøðilig ivamál.
Skotið verður harumframt upp, at Vanlukkutryggingarráðið fær møguleika fyri at heimila skrivaranum at taka avgerð í ávísum málum, soleiðis at lættari mál kunnu avgreiðast innan fyri rímiliga tíð. Talan er um mál, sum kunnu avgreiðast av skrivaranum við støði í meginreglum, sum kunnu dragast burturúr avgerðum, sum ráðið hevur tikið. Talan er ikki um mál, ið eru av prinsipiellum týdningi, ella mál, sum kunnu metast at hava stóran almennan áhuga. Slík heimiling skal vera ásett í reglugerðini fyri virksemið hjá Vanlukkutryggingarráðnum, ið sambært § 27, stk. 6 skal góðkennast av landsstýrisfólkinum.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Umhvørvismálaráðið, dagfesting.

**Ingilín D. Strøm**

landsstýriskvinna

/ Pól E. Egholm

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur